# Fundur um Kommunusamanlegging

**Bygdarráðslimir í Kommunusamtakinum í Sundalagnum høvdu mikudagin fund um kommunusamanlegging. Fundurin varð hildin á Hotel Vágum**

KOMMUNUMÁL
*Edvard Joensen*

**Vágar:** Tey arbeiða miðvíst við at leggja saman til eina stóra kommunu kring Sundalagið. Eisini Gjáar Kommuna er við i samtakinum.

Mikudagin hittust kommunustýrislimir í kommununum fram við Sundalagnum á fundi á Hotel Vágum. Tað eru kommunurnar úr Hósvik til Haldarsvíkar, Sunda Kommuna og Gjáar Kommuna, sum eru við í Kommunusamtakinum í Sundalagnum. Talan er um allar kommunurnar í Norður Eysturoy og Norðurstreymoy eystantil. Tó eru Eiðis Kommuna og Funnings Kommuna ikki við í samtakinum. Saksunar Kommuna er eisini við, men saksuningar hava gjørt av at leggja saman við Hvalvíkar Kommunu, eisini um stóra samanleggingin ikki verður til nakað.

Tað er semja millum kommunustýrislimirnar í samtakinum um at leggja saman. Men samanleggingin er ikki gjørd við tað, sigur Sofus Johannesen, borgarstjóri í Gjáar Kommunu, sum var við á fundinum á Hotel Vágum mikudagin.

Avgjørt er, at kunnandi fundir verða fyri allar borgarar í øllum kommununum, og síðan skal fólkaatkvøða haldast í hvørjari kommunu sær fyri at vita, um fólk yvirhøvur vilja leggja saman.

Tað er soleiðis, at verður gjørt av at leggja saman, er eingin vegur aftur. Borðið fangar. Stut og greitt tí, at Kommunulógin loyvir ikki, at kommunur verða býttar sundur aftur.

Nevnt verður í tí sambandinum, at eitt nú kollfirðingar noyðast at verða verandi i Tórshavnar Kommunu, um teir vilja ella ikki. Teir hava valt at fara uppí, og soleiðis verður tað. Í hvussu er so leingi, verandi kommunulóg virkar.

Tað er eitt sindur ymiskt, hvat fólk í kommununum halda um samanleggingina, sigur Sofus Johannesen, borgarstjóri við Gjógv. Sjálvur sigur hann seg ongar negativar viðmerkingar fáa frá gjáarfólki. Men onkra aðrastaðni hevur hann frætt, at onkur er, sum ikki er fyri samanlegging. Hóast tey tykjast fá, sum siga frá.

Tað eru serliga eldru fólkini, sum eru í móti samanleggingini, heldur borgarstjórin við Gjógv. Kanska tey, sum frá fyrr minnast, tá smáu kommunurnar vórðu til, eftir at hava ligið saman við størri bygdum. Tey hava helst ikki hug at koma aftur í ta støðu, tey minnast, at tær stóru bygdirnar fóru við øllum ágóðunum.

Men soleiðis metir sofus Johannesen ikki støðuna vera í dag. Fastar avtalur verða gjørdar, og tær munnu fara at verða hildnar, heldur hann.

Hann vísir eisini á, at tað verða fleiri og fleiri skyldur lagdar á kommunurnar at røkja, og tá krevjast stórar kommunur. Eitt nú barnaansing og frítíðarítriv av ymsum slagi. Slíkt, sum eldri fólk vanliga ikki hava so stóran tørv á, og tað kann eisini ávirka støðutakanina eitt sindur, heldur Sofus Johannesen.



*Bygdarráðslimir norðan úr Eysturoy og Streymoy hittust á fundi á Hotel Vágum mikudagin, har tosað varð um kommunusamanlegging*

# Sambýli til sinnisveik í Sandavági

**Almannamálaráðið hevur keypt eini sethús í Sandavági til sambýli til sinnisveik.**

**Sambýlið er ætlað fólki, sum ikki hava bráfeingins viðgerð fyri neyðini**

ALMANNAMÁL
*Edvard Joensen, Sandavági*

Fólk við sinnisbreki fáa nú tilboð um bústað í Vágum. Serliga verður hugsað um fólk, sum hava tilknýti til oynna. Eini sethús í Sandavági eru keypt til endamálið. Almannamálaráðið hevur keypt húsini.

Endamálið við sambýlinum er at hjálpa fólki við ávísum tørvi at húsast fyri seg sjálvan. Talan er um fólk við sinnisbreki, sum búgva heima hjá familju ella á eitt nú psykiatrisku deild, hóast tey eru liðugt viðgjørd.

Rósa Samuelsen, borgarstjóri í Sandavági, sigur, at hon fegnast um tiltakið. Hon sigur kortini, at hon ikki hevur fingið nakað nágreiniligt at vita frá Almannamálaráðnum um, hvør fer at búgva í húsinum. Tó væntar hon, uttan tó at kunna vísa á tað, at talan verður um fólk úr Vágum, sum í løtuni eru heimabúgvandi. Hon sigur, at tørvur er á slíkum staði í Vágum.

Eisini vísir hon á týdningin av at hava slík sambýli, tí brúk er eisini fyri teimum, sum hava sinnisbrek. Tey hava sínar uppgávur í samfelagnum, sum tey væl kunnu røkja. Tað síggja vit sjónliga aðrastaðani, har slík sambýli eru, og brúkararnir samstundis hava møguleika at fara til arbeiðis á vardum verkstøðum.

– Tann møguleikin eigur eisini at vera í Vágum, sigur borgarstjórin í Sandavági og vísir á, at í Sørvági er dagtilhald til millum onnur júst teirra, sum fara at búgva í sambýlinum í Sandavági.

Rósa Samuelsen sigur, at tað hevur verið arbeitt skjótt við málinum. Hon sigur, at málið kom upp fyrstu ferð á fundi við landsstýrismannin við almannamálum í Sandavági tann 26. september í fjør, og nú eru húsini keypt.

Tað verður pláss fyri fimm fólkum í nýggja sambýlinum i Sandavági.

Tað bar ikki til at fáa nærri at vita um keypið frá landsstýrismanninum við almannamálum, Pálli á Reynatúgvu. Hvørki hvat húsini kosta, um tey skulu byggjast um, hvussu nógv starvsfók verða í húsinum, ella annað, vit ætlaðu at spyrja hann um.



*Almannamálaráðið hevur keypt eini sethús í Sandavági til sambýli til sinnisveik*

*Mynd: Edvard Joensen*

## Óprofessionellur landsstýrismaður

**Landsstýrismaðurin við almannamálum noktar at úttala seg til Sosialin um mál, hann sum landsstýrismaðurin umsitur**

Tá undirritaði í arbeiðsørindum hósmorgunin ringdi til landsstýrismannin við almannamálum, Páll á Reynatúgvu, at fáa nærri at vita um húsini, Almannamálaráðið hevur keypt til sambýli í Sandavági, noktaði landsstýrismaðurin at tosa við blaðmannin.

Grundgevingin var, at hann tosaði ikki við sínar egnu »bøðlar«. Undirritaði fekk ikki aðra frágreiðing enn hana, at um undirritaði blaðmaður fekk tað sum hann vildi, sat landsstýrismaðurin ikki har, hann situr í dag, segði Páll á Reynatúgvu.

Grundina til slíkt svar má undirritaði bara rokna seg fram til, og verður úrslitið, at landsstýrismaðurin er fornermaður um skriving í Sosialinum fyri árum síðani um keyp og sølu av fastari ogn millum Páll á Reynatúgvu, táverandi borgarstjóra á Sandi, og Sands Kommunu.

**Edvard Joensen**
**blaðmaður**
**Sosialurin**
**Vága redaktión**



Skipasmiðjan á Skála:

# Gera tvey skip klár at flagga inn

**– Tað hevur verið eitt sindur slakt í byrjanini av hesum árinum, sigur stjórin, Marni Olsen**

ÍDNAÐUR
*Vilmund Jacobsen*

**Skáli:** Á Skipasmiðjuni á Skála starvast umleið 75 fólk tilsamans; tá eru lærlingarnir á stál-og maskindeildini, sum eru út við 20 í tali og skrivstovufólkið, íroknað.

Marni Olsen, stjóri, sigur, at tað hevur verið eitt sindur slakt við arbeiði í byrjanini av hesum árinum, men nú eru teir so í holt við at gera tvey skip klár at flagga inn undir føroyskt flagg.

### Westward

Westward, sum Kongshavnar Trolarafelag eigur, stendur í løtuni í dokkini. Skipið, sum er ein kombineraður trol-og nótabátur, er keypt úr Skotlandi og er á veg undir føroyskt flagg. Nøkur krøv, sum Skipasýnið og klassin seta, skulu fáa uppá pláss, og somuleiðis er skipið málað.

– Reiðarin samskiftir við skipasýn og klassa, og vit gera so tað, ið neyðugt er. Ein partur av hesum snýr seg um brand-og trygdarútgerðina umborð, sigur Marni.

Westward kom higar til lands fyrst í hesum árinum og hevur ligið á Skála einar 14 dagar. Skipið verður ikki liðugt í hesi vikuni, og helst gongur øll komandi vika, áðrenn loysast kann undir føroyskum flaggi.

### Sjagaklettur

Trolarin, Sjagaklettur, sum hvalbingar hava keypt úr Íslandi, er eisini á veg undir føroyskt flagg. Her seta Skipasýn og klassin eisini nøkur krøv og arbeiðið, sum skal gerast í hesum sambandi, verður gjørt á Skála.

Marni sigur, at nokso fitt er at gera við skipið, bæði apeteringsarbeiði, stálarbeiði og maskinarbeiði.

– Ætlandi verður Sjagaklettur liðugur um einar 5 vikur ella so. Arbeiðið uppá skipið er mett at kosta millum 2 og 3 milj. krónur – alt eftir, hvørji krøvini verða, tá ið saman um kemur, sigur hann.

Tilboð er givið uppá ein part av arbeiðinum, og fyri ein part av stálarbeiðinum er avtalaður ein kiloprísur.

### Eingin bygging

Sum skilst á Marna, er eingin nýbygging í ljósmála í løtuni.

Vit taka okkum mest av umvælingararbeiði, og soleiðis verður tað ivaleyst eisini frameftir, sigur hann.

– Vit hava gott fólk, og nógvir mans hava verið til arbeiðis á skipasmiðjuni í mong, mong ár, bæði smiðjumeistarar, bedingsmeistarar og menn á stáldeildini.

Áhugavert kann vera at nevna, at tá ið arbeiðir verða boðin út, kemur meira enn so fyri, at Tórshavnar Skipasmiðja og Skipasmiðjan á Skála kappast um at fáa arbeiðini.

– Jú, hetta kemur fyri, men tað er ikki soleiðis, at vit royna at kubba høvdið av hvørjum øðrum. Hvussu eitt tilboð fellir, avhongur eisini av, hvussu "svangur" tú ert, sigur Marni Olsen.

Tá ið Tórshavnar Skipasmiðja í sínari tíð keypti Skipasmiðjuna á Skála, fekk Poul Mohr skotið í skógvarnar, at nú fór eingin kapping at vera á økinum, men hetta er eftir øllum at døma ikki allur sannleikin.



*75 fólk eru til arbeiðis á Skipasmiðjuni á Skála, harav út við 20 lærlingar. – Tað kemur fyri, at vit kappast um tilboðini við Tórshavnar Skipasmiðju, sigur stjórin á Skála, Marni Olsen.*

# Góður havtaskutúrur

FISKIVINNA
Vilmund Jacobsen

Garnabáturin, Nim, hevur landað 32.000 pund av havtasku á Tvøroyri hesa vikuna.

Á virkinum hjá Fiskavirking siga tey, at hetta er ein góður túrur.

Trolarin, Vesturskin, hevur eisini landað á Tvøroyri í vikuni; teir høvdu 120.000 pund av upsa.

Fiskavirking á Tvøroyri hevur eisini keypt nakað av upsa frá Bresti, sum landaði í Hvalba.

Møguliga verður onkur landing aftrat í dag ella í morgin.

### Nógv arbeiði

Bjarni Hansen, virkisleiðari, sigur, at nógv fiskaarbeiði hevur verið á virkinum, síðan gongd kom á aftur eftir nýggjár.

– Vit hava arbeitt hvønn dag, síðan vit tóku ímóti fyrstu lastini í hesum árinum, sigur hann.



*Garnaskipið, Nim, hevur í vikuni landað 32.000 pund av havtasku á Tvøroyri.*

# Tvey nótaskip á Fuglafirði



*Christian í Grótinum var á Fuglafirði týsdagin við 800 tonsum av svartkjafti.*

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Á Havsbrún í Fuglafirði eru tey so smátt komin í gongd aftur eftir, at framleiðslan á virkinum at kalla hevur ligið still síðan fyri jól.

Fyrsti nótabáturin, sum hevur verið á Fuglafirði í ár, er Christian í Grótinum, sum hevði 800 tons av svartkjafti. Teir landaðu týsdagin.

Tá ið vit frættu av virkinum í gjár, hevði Norðborg eisini boðað frá landing. Teir høvdu eisini 800 tons av svartkjafti.

Ymiskar broytingar eru gjørdar á Havsbrún seinastu tíðina, og virkið hevur eisini fingið eina nýggja turku.